# Útbúgving sum heilsurøktari! Er tað nakað fyri teg?!



**Hvør kann gerast heilsurøktari??**

Tú, ið hevur áhuga fyri at arbeiða við fólki og sum hevur útbúgving sum heilsuhjálpari, ella hevur viðkomandi førleika grundaðan á annaðhvørt útbúgving ella starvsroyndir ella eina samanseting av hesum báðum.

Heilsurøktaraútbúgvingin er ein sera breið útbúgving, har næmingarnir læra at síggja menniskjað sum eina likamliga, sálarliga, sosiala og andaliga heild.

Hesar lærugreinir eru m.a. í útbúgvingini:

| Náttúrulæra | Mentan og virksemi | Námsfrøði/ sálarfrøði | Almanna- og samfelagsfak | Heilsa og røkt | Heilivágur |
|---|---|---|---|---|---|
| Føðslulæra, arbeiðsrørslur, flytihættir, persónligur stuðul, umsorgan, reinføri,<br><br>Kropsbygnaður, lívfrøði og mikrolívfrøði | Virksemi og mentan<br><br>Munurin at arbeiða á sjúkrahúsi og innan primera heilsuøkið<br><br>At varveita førleikan tá ein gerst eldri. | Arbeiðisumhvørvi, samskifti.<br><br>Menniskja – menning og virðing.<br><br>Meistring av ymiskum støðum.<br><br>Gerandislív | Tagnarskyldan<br><br>Rættindi<br><br>Samfelgslæra<br><br>Lívskor og livihættir.<br><br>Lógir innan fyri psykiatri.<br><br>Eldrapolitikkur | Sjúkrarøkt fyrr og nú.<br><br>Tørvir<br><br>Samstarv<br><br>At vera innlagdur.<br><br>Fyribyrgjan<br><br>Palliativ røkt<br><br>Eygleiðan<br><br>Sálarlig sjúkrarøkt. | Smitta á stovni og hjá menniskjanum.<br><br>Tað fríska og sjúka menniskja.<br><br>Heilivágslæra.<br><br>Læran um eldri. |
|  |  |  |  |  |  |

**Endamál við útbúgvingini er m.a.:**
- at geva førleika til sjálvstøðugt at røkja og leggja til rættis ítrivs- og umsorganaruppgávur, herundir samskipandi og undirvísingarligt virksemi, og til sjálvstøðugt at røkja grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøktaruppgávur á almanna og heilsuøkinum."

Útbúgvingin byrjar í viku í 15 í apríl 2006. Undirvísingin er skipað í evnir og fyrigongur partvís í bólkum. Starvsvenjingin gongur fyri seg á vannligum sjúkrahúsdeildum, innan psykiatriøkið og á ellisheimum, sambýlum og í heimarøktini.

Tú fært útbúgvingarstuðul undir útbúgvingini.

**Umsóknarfreistin er 13. februar 2006.**

Hevur tú hug at søkja, ella vilt tú vita meira, so ring 372 855.

**HEILSUSKÚLI FØROYA**
Tvøroyri
www.skulin.fo/ahd - heilsuskulin@skulin.fo